## DAGSINS MEINING

# Nú ella ongatíð

Eina fjórðingsøld ov seint kemur frágreiðingin um støðuna og framtíðina hjá útoyggjunum, og hon kemur til ta somu niðurstøðu, sum fleiri ferðir fyrr er staðfest á hesum stað: at jarðarviðurskiftini eru tey mest avgerandi fyri framtíðina hjá útoyggjum og smáplássum. Um ikki fólk á staðnum, ella tey sum hava hug at flyta á smápláss, fáa jørðina til brúks ella ognar, verða útoyggjar avtoftaðar og verða í framtíðini summarbústaðir hjá fráfluttum og ættarfólkum teirra.

Men rætturin til jørðina er ikki einasta fyritreytin fyri at fáa fólk, og serliga familjur við børnum, at trívast og vaksa upp í útoyggjum og smáplássum. Aðrar fyritreytir sum samferðsla, samskifti, aðrir arbeiðsmøguleikar, góð skúlaviðurskifti, almanna- og heilsutænastur, tryggleiki, og frítíðar- og mentanartilboð mugu verða til steðar.

Øll hesi viðurskifti verða viðgjørd væl og virðiliga í tí frálíku frágreiðing, sum útoyggjanevndin við Olgu Biskopsstøð á odda hevur savnað saman tilfar til og orðað. Nú hava vit gott tilfar – hagtøl, áskoðanir og uppskot – at virka víðari á. Ikki tí, nógv hevur verið frammi í fjølmiðlum millum ár og dag, men tað hevur verið spjatt og heldur ikki fullfíggjað og í slíkum hami.

Nevndin skal stórt hava rós fyri arbeiði og avrik sítt, og eisini skal Olga Biskopsstøð hava rós fyri opinleika. Hon hevur viljað greitt frá gongdini so hvørt, og harafturat eru partsniðurstøður lagdar út á alnótina av og á. Tað hevur verið gott hjá fjølmiðlum og tí eisini Føroya fólki, sum fyri stóran part er áhugað í hesum arbeiði eins og støðuni hjá útoyggjum.

So vítt og so gott. Nú er tann stóri spurningurin eftir: vilja politikkararnir av álvara gera nakað við spurningin? Higartil hevur jørð og ognarrætturin til hana verið ein heilag kúgv! Men løgtingið, og kanska serliga einstakir løgtingslimir, mugu gera sær greitt, at verður ikki ein grundleggjandi og miðvísur politikkur lagdur fyri útoyggjar og smápláss nú, so gera hesir politikkarar seg skyldugar í, at útoyggjar og smápláss verða upp aftur meiri armað og helst eisini avtoftað. Tí kann at enda staðfestast: annaðhvørt nú ella ongatíð!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lat okkum ikki blaka alt fyri bakka

**Viðmerking til seinastu samgongukreppuna**

**Helena Dam á Neystabø**
*Tórshavn 20. apríl 2001*



Eftir stríðið millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin um tann førda fíggjar- og búskaparpolitikkin fyri páskir, og bræv Tjóðveldisfloksins til samgonguflokkarnar, valdi eg sum formaður Sjálvstýrisfloksins at tala at, og biðja løgmann umhugsa støðuna.

Kann hann sum samgonguleiðari liva við, at samgonguflokkarnir nú hvør í sínum lagi taka undir við andstøðuuppskotum, sum kosta 10 tals milliónir, og kann hann liva við, at borðreitt verður við íløguætlanum í vegir, tunnlar, havnaløg, skip og annað mangt, sum fleiri ferðir spreingja íløgukarmin, sum samgongan hevur sett út í kortið. Vit minnast enn, at ein tann mest átrokandi íløgan í Landssjúkrahúsið mátti toyggjast yvir eitt nógv longri tíðarskeið, enn neyðugt. Og millum lítið og einki kundi setast av til menningartarnað, sálarsjúk og onnur, sum ongan bústað hava.

Eg vísti á páskum á, at løgmaður átti at taka støðu til, um henda gongd skal sleppa at halda fram, og um so er, hevði tað tá ikki verið betri, at spart Føroya fólk fyri eitt so dýrt valár?

Eg hugsi, at nógv vóru samd við mær í hesi politisku meting.

Tað kom so langt, at formaðurin í Fíggjarnevndini segði, at afturfyri, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevði gjørt ein - eftir mínari hugsan skilagóðan sáttmála – við Starvsmannafelagið, ja so fór hann, ella fólkaflokkurin, at leggja eina røð av avgjalds- og skattalækkingum fram.

Altso yvirhøvur eingin samskipan. Og skal alt hetta fremjast í einum, ja so hótta vit av álvara búskapin, okkara kappingarføri, og grundarlagið undir einum sjálvberandi búskapi, sum er treytin fyri okkara felags sjálvstýrisætlan.

**Tey sum eru ringast fyri, skulu hava ágóðan**

Vit mugu alla tíðina minnast til, at tað snýr seg um, at lætta um hjá teimum, sum hava truplastu korini. Tey eiga tørn nú. Vit vita av royndum, at tað eru altíð tey minni mentu, sum verða við sviðu soð, tá ið á stendur.

Tí taki eg fult undir við nýggja lønarsáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum, sum lyftir tær lægstu lønirnar upp, og eg ivist ikki í, at hetta verður leisturin, sum verður galdandi fyri øll fakfeløgini.

Eisini taki eg fult undir við, at geva teimum lægstløntu ein munagóðan skattalætta.

Tað sum eg vegna Sjálvstýrisflokkin gera vart við er, at verða allar hesar stálsettu og betongkendu verkætlanir settar í verk nú, samstundis sum ein røð av skatta- og avgjaldslækkingum skulu veitast og samstundis sum lønirnar hækka, ja so fer søgan at endurtaka seg, at einki verður eftir til tey, sum veruliga hava ein ágóða og bata fyri neyðini.

Henda samgongan hevur sanniliga fingið nógv skilagott av skafti. Og mangir føroyingar, bæði pensjonistar og onnur, munnu sanna, at tað gongur framá. Sjálvstýrismálið hava vit loyst á ein hátt, sum vit í Sjálvstýrisflokkinum fegnast um. Tað má ikki henda, at alt hetta verður blakað fyri borð av yvirbjóðing og útgjaring.

# Rætting/viðmerking til tíðindini í útvarpinum í kvøld

**Per Niels Persson,**
*fm.*
*tann 19. apríl 2001*

Útvarp Føroya nevndi í tíðindunum í kvøld samrøðu við undirritaða. Sum ikki einaferð, so kennir ein ikki alt aftur, sum verður endurgivið.

Dia Midjord ringdi til undirritaða í dag og greiddi mær frá, at hann hevði tosað við Høgna Hoydal, landsstýrismann, um yvirtøkumál. Høgni hevði tá upplýst honum, at Føroya Politistafelag ikki »slapp« at vera við í arbeiðsbólkinum, tí CO II hevði noktað hesum. Tað er CO II, sum hevur allan samráðingarrættin, men nú hevði stjórnin noktað teimum at verða við í hesum.

Eg greiddi Dia í stuttum frá, at tað er rætt, at CO II hevur allan samráðingarrætt hvat viðvíkur setanar- og lønarviðurskiftum. Herundir sjálvsagt pensiónir og Útbúgving. Vit eru sum danskt politi limir í PID, sum aftur er limur í CO II, sum hevur allan samráðingarrætt yvir fyri stjórnini.

At danska stjórnin skal hava sett CO II forðingar fyri at luttaka í hesum arbeiði má byggja á eina misskiljing onkunstaðni, tí CO II er ein fakfelagsskapur, og har kann ongin politikari geva harraboð.

Vit hava ikki fingið noktað nakað frá CO II. Tað liggur ein greið avtala millum okkum í FP og PID, at CO II skal halda fast við samráðingarrættin. CO II hevur sent landsstýrinum bræv hesum viðvíkjandi, har teir biðja landsstýri seta seg í samband við teir um setan av arbeiðsbólki, **men higartil hevur landsstýrið ikki ønt teimum aftur. Tað er sostatt ikki stjórnin, men landsstýrið, sum forhálar málið.**

Dia spurdi meg síðani, um vit vildu finna okkum í hesum og bert sita hendur í favn. Til hetta svaraði eg, at avtalan við CO II er gjørd í samráð við okkum, og at vit ongantíð fara at sita hendur í favn.

At hann so fær tíðindini í útvarpinum at ljóða annarleiðis, eru hansara orð. Okkara stutta samrøða var, sum skrivað omanfyri.

Hetta er bert ætlað sum ein viðmerking til, at tað, sum verður endurgivið í fjølmiðlunum, ikki altíð er samsvarandi veruleikanum.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Svar til Fólkaflokkin

**Vegna Javnstøðunevndina**
**Turið Debes Hentze, fork.**



Í viðmerkingini frá Fólkaflokkinum til Javnstøðunevndina um ætlaða skattalættan til giftar menn eru so nógvir skeivleikar og beinleiðis ósannindi, at ein rættleiðing er neyðug:

- Tað er ikki rætt, at verandi skattalóg ger mun á giftum kvinnum og ógiftum, tí báðar skulu gjalda skatt av inntøkum sínum. Og er ongin inntøku, er ongin skattur at gjalda. Tann heimaarbeiðandi húsmóðirin, sum onga inntøku hevur, rindar tí heldur ikki skatt.
- Tað er heldur ikki rætt, at maðurin verður revsaður, tí at konan ikki hevur inntøku. Hann rindar skatt sum einhvør annar sambært skattaskipanini. Hann hevur hin vegin eina konu heima sum syrgir fyri honum, húsi og børnum. Hesa veiting fær hann skattafría, og afturfyri undirheldur hann fíggjarliga konu og børnum, og hesum rindar hon hinvegin heldur ikki skatt av. So kann altíð spyrjast, hvussu hesar veitingar viga upp móti hvørji aðrari fíggjarliga og í aðrar mátar. Men soleiðis hava tey skipað seg.
- Tað er heldur ikki rætt, at verandi skattalóg tvingar fólk at skilja seg. Tann gifta kvinnan við ongari inntøku verður ikki betri fyri skattliga, um hon verður skild, tí um hon onga inntøku hevur, rindar hon framvegis ikki skatt tá. Heldur verður hon verri fyri, tí at hon tá ikki longur skattafrítt kann fá pengar ella annað uppihald goldið frá manninum. Nú eru hesir pengar skattskyldugir.
- Tað er óseriøst og hevur ikki annað endamál enn at grugga skattamálið og viðgerðina av hesum at tosa um hjúnabandsstøðuna innan almannalóggávuna. Ivaleyst er har okkurt at tosa um eisini, men hevur tað onki við ætlaða skattalættan at gera.

Í proklamatiónini frá Fólkaflokkinum verður sagt, at Javnstøðunevndin loypir á familjuna, hjúnalagið og giftu barnamammurnar. Hetta er eisini skeivt!

Ørindini hjá javnstøðunevndini vóru at vísa á, at um endamálið við skattalættanum var at lívga um barnafamiljuna, so skuldu allar barnafamiljur takast við og ikki bert tey giftu. Børnini skulu ikki revsast fyri at foreldrini ikki eru gift, og tað eru børnini sum eiga at vera kjanin í hesum máli. Og tá umleið annaðhvørt barn í dag verður føtt uttan at mamman er gift, so tosa vit um nógvar familjur ella forsyrgjarar.

Ørindini vóru eisini at vísa á, at kvinnan sum tann fíggjarligt veikari parturin í hjúnalagnum skal ansa sær ikki at vera nýtt á ein hátt, sum ikki gagnar henni meiri enn kanska bara beint her og nú, og at hon ikki skal viðgerast sum eitt viðhang hjá manninum, men sum sjálvstøðugur persónur. Og at vísa á, at framtíðin hjá teimum ungu kvinnunum ikki liggur í húsmóðirarbeiðinum burturav, men í útbúgtving og arbeiðsinntøku, sum gevur persónligt og fíggjarligt frælsi.

Illgrunin um, at uppskotið í veruleikanum er skattaspekulatiónspolitikkur ílatin sum familjupolitikkur er bert styrktur aftaná at viðmerking fólkaflokksins, sum hevur hetta at bjóða tí heimaarbeiðandi konuni: at passa egnu børnum sínum og spara samfelagnum fyri millióna-upphæddir í alm. barnaansing. Afturfyri skal maðurin fáa skattalætta.

Og tá sambandsflokkurin sigur, at tað eru fleiri konur sum ikki sleppa út at arbeiða, tí tær fáa ikki børnini ansaði, kann bara spyrjast, jamen hvat hjálpir skattalættin uppá tað. Var so ikki vert ístaðin at umhugsa fleiri og betri ansingarmøguleikar. Tað tykist veruliga sum, at hesir flokkar ynskja at halda kvinnunum heima fyri at spara ansingarpláss. Um kvinnurnar spara samfelagnum milliónaupphæddir, sum sagt verður, og ynski er framhaldandi um at halda teimum heima uttan valmøguleika at fara út í arbeiði, tí ansingarstovnar ikki skulu gerast, so skuldi vera lagamanni at útgoldið hesum kvinnm veruligar almennar lønir, sum eru at liva av (skattalætti er eisini almennur peningur) ikki bert teir smáu lokkubitar, sum higartil hava staðið teimum í boðið. Og hesar lønir skulu gjaldastbeinleiðis til tær mábarnamammur (ella teir pápar) sum gera arbeiði og ikki umvegis hin hjúnafelagan. Talan verður tá um eina løn ella sosiala veiting, sum ikki viðvíkir skattalógini.

Er talan um sosiala veitingum sum ávirkast av hjúnabandsstøðuni, so minkar upphæddin á veitingini tess størri inntøku hin hjúnafelagin hevur og veksur tilsvarandi, um hjúnafelagin lítla inntøku hevur. Tá verður úrsliti ta løgna og júst øvugta av tí, við skattauppskotinum. Tá fáa tey mest trongjandi meir burturúr og tey við hægri inntøkuni minni, og ikki sum sambært skattauppskotinum, at bert tey við ávísari høgari inntøku fáa ágóða.

Annars var grundsjónarmiðið í skrivinum frá Javnstøðunevndini: Latum okkum fáa tað, sum tørvur er á í samfelagnum, fáa barnaansing. stuðul til børn og trongjandi, og skipa so fyri at bæði kvinnur og menn fáa møguleika fyri at sameina familjulív og arbeiðslív uttanfyri heimið, tí tað verður framtíðarkravið hjá teimum komandi familjunum.

# Útoyggjaálitið

**Palli Dalsgaard**

Útoyggjaálitið er komið á borðið. Vit hoyrdu nakað í Fimmaranum um hvat stendur í tí. Sjálvandi ljóðar sumt av tí, har er komið á pappírið, sum ynskidreymar, tað vil so vera, og kostnaðurin av mongum ovurhonds dýrur. Tað er nakað, sum politikararnir mugu taka støðu til, vónandi verður okkurt av tí, har stendur, til nyttu og gleði hjá teimum, sum hava hasa hjálpina fyri neyðini.

Spurningurin um uttanbygdajørð var eisini frammi í Fimmaranum. Hesin spurningur hevur mangan verið á lofti, tá fólk, sum eiga hesa jørð, eru bangin fyri at hon verður tikin frá teimum við lóg. Tað verður hon ikki. Nakað annað er, um ikki løgtingið skuldi umhugsað at latið Jarðarráðið keypt ognarjørð úti um bygdirnar og lagt hana afturat teimum festigørðunum, sum eru á plássinum.

Keypsprísurin mátti verið so, at hann var nøktandi fyri báðar partar. Tað sita ikki so fá gomul á teim ymsu bygdunum, sum eiga ein ella tveir gyllin. Børnini eru farin av bygdini, sjálv orka tey ikki meira, eingin er at keypa, tí fólkatalið er minkað og minkar. Tað hevði óivað komið væl við, har garðarnir eru ov smáir sum er. Og hjálpt til at bøndurnir ikki eisini rýma av bygdunum.

Eitt tað mest hugstoytta á bygdunum er har bøndurnir leggja frá sær. Bóndin skapar eitt lív alla tíðina, vit leggja tíverri ikki merki til tað so leingi fólk er á bóndagørðunum, ikki fyrr enn tey eru farin, gongur tað upp fyri okkum hvat virði tey høvdu. Trúgvi ikki, at nakar hevur nakað ímóti at útoyggjarnar fáa hjálp til sjálvhjálp. Tvørturímóti unna vit teimum tað væl og vóna, at tað fer at gagna teimum væl. Men so løgið tað ljóðar eru nógvar av teim smáu bygdunum í somu støðu sum útoyggjarnar hvat fólkaflyting viðvíkur, hóast vit hava bæði gott ferðasamband og skúlar.

